HTM
HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN

htm@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

*Umsóknarfreist: mánadagin 4. august 2008.*



# ERGOTERAPEUTUR ella FYSIOTERAPEUTUR

## til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

**Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur, og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!**

Eitt av starvsfólkum okkara hevur leitað sær aðrar avbjóðingar og er tí á HTM eitt fyribilsstarv sum ráðgevandi og málsviðgerandi Ergoterapeutur, ella Fysioterapeutur, leyst at seta beinanvegin og fyribils til 31. juli 2009, við møguleika fyri føstum starvi.

Talan er um fulltíðarstarv á 40 tímar um vikuna.

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur**
- útbúgving sum ergoterapeutur ella fysioterapeutur

**Ynskiligt er at umsøkjari hevur**
- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evni at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevni
- góð evni at orða seg, munnliga og skrivliga
- teldufærleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flekstíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, á telefon 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til: Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, FO-110 Tórshavn, ella við teldupostil til: htm@almannastovan.fo.

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 12 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv, innan- og uttanhýsis.

KREA




SENDISTOVAN

## Vaktleiðari til Kommunalu brennistøðina

Sóknast verður eftir vaktleiðara til Kommunalu brennistøðina á Hjalla. Arbeiðið umfatar rakstur av brenniovni í døgnvaktarskipan umframt umvæling og røkt av útgerð, maskinum o.ø. á brennistøðini.

**Førleikakrøv**

Tú ert útbúgvin handverkari, helst innan jarn/metal. Fyrimunur er við royndum á viðkomandi øki. Tú hevur eisini koyrikort og teldukunnleika á brúkarastigi.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett frá 1. september 2008 ella skjótast til ber. Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meira at vita**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bárð Michelsen, leiðara, tlf. 228918, ella Mikkjal Absalonsen, tekniskan leiðara, tlf. 217582.

**Umsóknir**

Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu sendast til Tórshavnar kommunu, Postsmogu 32, FO-110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. juli 2008 kl. 12.00. Viðmerkið „Vaktleiðari til Kommunalu brennistøðina" á umsóknina.

Tórshavnar kommuna